gult10 cyan10 magenta10 svart10

Tilfeingið skal brúkast

Kanadiska umboðið á ráðstevnuni heitti á fundarfólkið um at gagnnýta tilfeingið í Norðuratlantshavi til fulnar. Hon vil einki hava við umhvørvisfelagsskapir at gera

VEIÐA
Eyðun Klakstein

– Tilfeingið í havinum skal gagnnýtast til fulnar, men vit skulu hava atlit til umhvørvi og ikki ovurfiska stovnarnar.

Tað segði kanadiska umboðið á ráðstevnuni fyri náttúruvernd og burðardygga veiði í Norðuratlantshavi.

Mary Simon, sum er kanadiskur sendiharri í Danmark, umboðaði kandisku stjórnina á stevnuni, og hon greiddi frá støðuni hjá teimum, sum liva norn á jarðarknøttinum.

Mary Simon hevur arbeitt nógv við treytunum hjá teimum, sum búgva í polarkringinum, og hon hevði sína avgjørda meining um, at tilfeingið í sjónum skal brúkast til fulnar.

– Tað er vorðið ein meiri viðurkend hugsan í Kanada, at vit skulu veiða og nýta fiskin í sjónum, heldur enn at lata fiskin fáa frið. Fiskur er matur, og hann hevur stóran týdning fyri nógv samfeløg í Norðuratlantshavi, greiddi Mary Simon frá.

– Fólk eru ein partur av havinum, og vit skulu veiða. Vit skulu fiska, men ansa eftir, at vit ikki ovurfiska. Vit skulu hava burðardygga fiskivinnu, so eisini komandi ættarlið hava somu møguleikar, sigur Mary Simon, kanadiskur sendiharri í Danmark

Út við felagsskapum

Í hennari parti av heiminum er tað ikki eins sjálvsagt hjá øllum, at tilfeingið í havinum skal gagnnýtast.

Í Føroyum og í okkara næstu grannalondum er eingin ivi um, hvat fiskurin skal nýtast til, men í Norðuramerika og aðrastaðni eru nógv sum halda, at veiðan av fiski skal verða lítil ella eingin.

– Fólk eru ein partur av havinum, og vit skulu veiða. Vit skulu fiska, men ansa eftir, at vit ikki ovurfiska. Vit skulu hava burðardygga fiskivinnu, so eisini komandi ættarlið hava somu møguleikar, sigur Mary Simon.

Kanadiska sendiharrin hevði sína avgjørdu hugsan um umhvørvisfelagsskapir, sum hava áhuga fyri ymiskum viðurskiftum í polarkringinum og Norðuratlantshavi annars.

– Vit skulu einki hava við víðgongdar umhvørvisfelagsskapir at gera, tí tað ber ikki til at tosa við teir. Teir skilja bara síni egnu sjónarmið og royna at kroysta teir niður yvir øll onnur, sigur Mary Simon.

Gera ónáðir

Mary Simon heldur, at allir felagsskapir eru ikki eins, og tí ber ikki til at útihýsa teimum øllum. Men tað ber til at staðfesta, hvat felagsskapirnir standa fyri við at hyggja eftir teirra arbeiði og ætlanum.

– Fólk í polarkringinum hava ringar royndir av umhvørvisfelagsskapum, sum hava gjørt stóran skaða fyri umstøðurnar hjá nógvum fólkum. Tí skulu vit als ikki taka teir upp á ráð, tá vit arbeiða við burðardyggari fiskivinnu ella aðrari veiði, sigur Mary Simon.

– Vit hava roynt at tosa við summar felagsskapir, men tað spyrst sjáldan nakað burtur úr. Felagsskapirnir vilja bara hava síni sjónarmið ígjøgnum, og so leggja teir líka í restina. Tað er spill av tíð at fáast við teir, sigur hon.

Mary Simon heldur, at londini í Norðuratlantshavi duga væl at brúka tilfeingið úr náttúruni við skili, men at tað er umráðandi at hava eitt vakið eyga við gongdini alla tíðina.

Færri arbeiðspláss í fiskivinnuni

Aðalstjórin fyri fiskivinnunevndina hjá ES heldur, at eitt aðalmál við fiskivinnupolitikkinum skal verða at minka um flotan og ráða fiskimonnum til at fáa sær annað arbeiði

POLITIKKUR
Eyðun Klakstein

– Vit koma ongan veg, um vit hvør í sínum lagi royna at loysa trupulleikarnar í fiskivinnuni. Vit skulu samstarva og verða opin mótvegis hvørjum øðrum, sigur Steffen Smidt, sum er aðalstjóri fyri fiskivinnunevndina hjá ES

Seinnapartin hósdagin greiddi aðalstjórin fyri fiskivinnunevndina hjá ES frá, hvussu ES hugsar sær at loysa nøkur av vandamálunum í fiskivinnuni.

Hetta gjørdi hann fyri fundarluttakarunum á stóru umhvørvis- og fiskivinnustevnuni, sum hevur verið í Norðurlandahúsinum.

Steffen Smidt, sum er dani, heldur, at ein týðandi partur av framtíðar fiskivinnupolitikkinum hjá ES skal verða at minka um fiskiflotan, tí veiðiorkan er alt ov stór.

– Vit skulu minka um íløgustuðulin til nýggj skip og heldur geva stuðul til upphøgging. Vit skulu eisin hjálpa fiskimonnum at fáa arbeiði í aðrari vinnu, har umstøðurnar eru tryggari og framtíðarvánirnar betri, sigur Steffen Smidt.

Hann heldur, at fiskivinnutjóðirnar skulu gera sær greitt, at tað í framtíðini verða færri fiskiskip og færri arbeiðspláss í fiskivinnuni.

Minkingin av fiskiorkan er ein táttur í at skapa eina burðardygga fiskivinnu í ES.

Út við útblaking

Steffen Smidt greiddi frá, hvørjir stór mál eru at loysa í fiskivinnupolitikkinum hjá ES.

Hann tosaði nógv um útblaking, sum er vorðið ein umfatandi trupulleiki í ES. Tað tykist verða ógjørligt at sleppa av við trupulleikan, men ES skal gera eina roynd at fáa bilbukt við trupulleikanum, heldur hann.

– Vit hava brúk fyri øllum góðum ráðum og vitan, sum granskingin kann geva okkum, og tað er eisini umráðandi, at vit samstarva um fiskivinnupolitikkin, sigur Steffen Smidt.

– Vit koma ongan veg, um vit hvør í sínum lagi royna at loysa trupulleikarnar í fiskivinnuni. Vit skulu samstarva og verða opin mótvegis hvørjum øðrum.

Steffen Smidt heldur, at tað er umráðandi at finna eina hóskandi balansu millum stóru ídnaðarligu fiskivinnuna og tey smáu fiskivinnusamfeløgini.

gult11 cyan11 magenta11 svart11

Skulu ansa eftir grønum felagsskapum

– Tað er primitivt ikki at lurta eftir sjónarmiðum hjá hvørjum øðrum. Tí kunnu vit saktans tosa við umhvørvisfelagsskapirnar fyri at fáa at vita, hvat teir halda, men vit mugu ikki lata teir forskrekkja okkum við víðgongdum sjónarmiðum, og vit mugu allatíðina hugsa um at upplýsa fólk, sigur Sofus Poulsen

– Umhvørvisfelagsskapir mugu ikki sleppa at ávirka arbeiðið við burðardyggari menning í fiskivinnuni, sigur Sofus Poulsen, føroyskur umboðsmaður í Bretlandi

FELAGSSKAPIR
Eyðun Klakstein

Føroyski umboðsmaðurin í Bretlandi tók orðið, tá kjak var á ráðstevnuni fyri burðadygga menning og vernd av havinum í Norðurlandahúsinum hósdagin.

Sofus Poulsen heitti á fundarluttakararnar um at ansa eftir umhvørvisfelagsskapum í arbeiðnum við burðardyggari menning í fiskivinnuni.

– Vit mugu gera okkum púra greitt, at hesir felagsskapir eru djóravinir og eru ímóti veiði av djórum. Teir eru hvørki vinir hjá fiskimonnum ella oyggjasamfeløgum sum okkara, tí skulu vit ansa eftir teimum, sigur Sofus Poulsen.

Sofus Poulsen hevur í sínum arbeiði sum umboðsmaður føroyingar í Bretlandi merkt nógv til ágangin frá umhvørvisfelagsskapum – serliga í sambandi við føroyska grindadrápi.

Summir av hesum felagsskapum hava eisini stóran áhuga fyri fiski og royna at ávirka fólk og politikarar til at taka undir sínum sjónarmiðum.

Kenna teirra sjónarmið

Sofus Poulsen mælir ikki til fullkomið boykott av umhvørvisfelagsskapum, men hann heldur, at hesir felagsskapir skulu ikki hava ov stóra ávirkan.

– Tað er primitivt ikki at lurta eftir sjónarmiðum hjá hvørjum øðrum. Tí kunnu vit saktans tosa við teir fyri at fáa at vita, hvat teir halda, men vit mugu ikki lata umhvørvisfelagsskapir forskrekkja okkum við víðgongdum sjónarmiðum, og vit mugu allatíðina hugsa um at upplýsa fólk, sigur Sofus Poulsen.

Hann mælti á ráðstevnuni hósdagin til, at londini í Norðuratlantshavi gera upplýsandi tilfar á til dømis sjónbandi, so tað ber til at upplýsa neyvari um støðuni og treytirar hjá fiskivinnuni og um hvussu tilfeingið í sjónum kann brúkast.

Sofus Poulsen sigur, at ágangurin frá umhvørvisfelagsskapum mótvegis føroyingum er nógv minkaður. Føroyski umboðsmaðurin í Bretlandi fær ikki longur so nógvar atfinningar, sum hann plagdi at fáa.

Úr øllum heraðshornum

Ørgrynna av týðandi fólki, sum fæst við fiskivinnu í Norðuratlantshavi, hevur verið á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum

RÁÐSTEVNA
Eyðun Klakstein

Stóra ráðstevnan um umhvørvisvernd og burðardygga fiskvinnu, sum hevur verið í Norðurlandahúsinum hódagin og fríggjadagin, savnaði nógvar týðandi fiskivinnupersónar.

Ráðharrar, granskarar, embætismenn, professarar, tingfólk og fjølmiðlafólk úr nógvum londum hava verið á ráðstevnuni, sum bjóðaði fyrilestrar og kjak um umhvørvi og fiskivinnu.

Løgmaður og fleiri landsstýrismenn hava hildið til í Norðurlandahúsinum farnu tveir dagarnar, og her hava teir hitt starvsfelagar úr Noregi, Íslandi og Skotlandi.

Bæði hósdagin og fríggjadagin vóru fyrilestrar á skránni, og millum tey, sum hava havt fyrilestur, eru Mark Kurlansky, rithøvundur úr USA, Bogi Hansen, granskari, Steffen Smidt, aðalstjóri fyri fiskivinnunevndina hjá ES, og Ragnar Árnason, professari úr Íslandi.

Sjálv ráðstevnan endaði seinnapartin í gjár, men tá varð fundarfólki boðið umborð á nýggja vaktarskipið, Brimil, har Jørgen Niclasen var vertur.

Lærið av okkum newfoundlendarum

Jústinus Leivsson
Eidesgaard

Toskastovnurin við Newfoundland er so illa fyri at lønandi veiða eftir honum er ikki gjørlig og onki røkist fyri, at stovnurin fer at menna seg aftur.

Gerry Reid fiski og aliráðharri í Newfoundlandi og í Kanada kom við greiðum boðskapi á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum í gjár.

-Lærið av okkum. Havið er ikki ótømandi, komið ikki í ta vánastøðu sum okkara fiskivinna er komin í, segði Gerry Reid.

Tað kann vera so skjótt. Í áttatiárunum var nógvur toskur við New Foundlands strendur. Men veiðan var eisini ovurhonds stór og seinast í áttati árunum varð tikið so nógv av gýtingarstovninum, at toskurin ikki megnaði at vaksa aftur.

-Onnur fiskasløg, rækjur og krabbaveiða eru komin inn, har toskurin slepti, soleiðis at peningaliga er kanska sama úrslitið, men stóri trupulleikin er, at nýggi fiskiskapurin gevur nógv minni arbeiði. Arbeiðsloysi er stórt í New Foundlandi. Í áttatiárunum vóru eini 1400 fiskivinnusamfeløg í New Foundlandi og Labrador, hetta er nú minkað niður í 600, segði Gerry Reid.

-Newfoundland varð bygt fyri 500 árum síðan júst av fiskivinnu. Síðan tá hava fólk livað av fiskivinnu. Talan er um ein stóran mentunnararv. Men vit hava ikki røkt hann nóg væl. Toskaveiðan í Newfoundlandi er í dag bara tvey prosent av tí hon var í áttatiárunum og hesi tøl siga alt, segði Gerry Reid..

Norðuratlantshavið er okkara heim, og vit hava stóra skyldu mótvegis okkara eftirkomarum, at røkja havið væl. Tí kann eg siga utta at ívast. Gerið ikki sum vit í New Foundlandi og Labrador. Havið er ikki ótømandi, segði hann